# Nøvn

## TØKK

Hjartans tøkk fyri sýnda umsorgan og samkenslu tá ið okkara høgt elskaði sonur og beiggi



**Rói Heinesen**
**Bøur**

so brádliga bleiv tikin frá okkum.

Tøkk til familju, vinir og stuðlanar í hava hjálpt okkum, so væl í hesi sváru tíð.

Tøkk til Sverra Steinholm og Ingu Poulsen Dam fyri góð og troystarík orð í kapellinum, í heiminum og í kirkjuni.

Eina stóra tøkk til Theodor og Lovindu fyri yndisligar sangir í kirkjuni. Somuleiðis tøkk til kirkjutænarar, sangarar, organist í kapellinum og líkvognskoyrara.

Tøkk til tykkum, sum mintust Róa við kransum, blómum og við peningagávu til fríðtíðarklubban.

Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Tøkk til øll, ið á ymiskan hátt hjálptu til við ervinum. Tøkk til pakkhúsið fyri at húsa ervinum.

*Familjuna vegna*

***Mamma, Babba, Ingunn, Brandur og Bjørk.***

*Gakk tú tryggur fram við góðum treysti,*
*Allir ljósir einglar fylgja tær.*
*Harrin, hann er vinur tín tann besti,*
*hansar´eyga allar vandar sær*

## TØKK

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum gleddu meg á mínum 80 ára føðingardegi.

*Bestu heilsanir*

**Henning Morgensen**

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá kæri pápi, abbi og langabbi okkara

**Karl Jespersen**
(Gigekarl)

doyði og varð jarðaður.

Takk til starvsfólk á Landssjúkrahúsinum og Suðuroyar Sjúkrahúsi fyri tað, tit gjørdu fyri hann.

Takk til Jónsvein Bech fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni, og takk til kirkjutænarar og sangarar.

Takk fyri heilsanir, blómur og kransar og takk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Jonhard, Michela, Rói, Charlie, Georg, Meivør og Oddbjørg**

## TØKK

Hjartans tøkk fyri sýnda umsorgan og samkenslu, tá ið kæra kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Kristin Thomsen**

var sjúk og andaðist. Tøkk til tykkum øll, sum vóru um hana og okkum í hesu sváru tíð.

Tøkk til Bjarna Bæk, fyrrv. dómpróst, fyri uggandi orð á Landssjúkrahúsinum og til Hera Joensen, prest, fyri góð og fløvandi orð í kapellinum og í kirkjuni. Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og organist.

Tøkk til familju, vinir, kenningar, starvsfelagar, starvsfólk á Landssjúkrahúsinum, starvsfólk á Hotel Tórshavn og á Ríkissjúkrahúsinum, sum við troystarríkum bønum, orðum og gerðum vóru hollir stuðlar hesa tíð.

Tøkk til tykkum øll, ið hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.

Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað. Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.

*Familjunnar vegna*

**Andrass, Lydia Maria, Hjørdis, Arnóra og Jóna Kristin.**

†

## ANDLÁT

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Martin Vilhelmsen, Tórshavn,**

andaðist á Landssjúkrahúsinum hósmorgunin 92 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahús-kapellinum leygardagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju sunnudagin kl. 13.00

*Familjurnar vegna,*

***Judith, Ása, Robert, Sonja, Johanna, Anita, Marjun og Eyðun.***

## Minningarorð um Róa Heinesen Bøur

Tú var og er tann størsta stjørnan
Tú blomstraði um veturin
Tú fylti mína kurv við gleði hvønn dag
Eg síggi tín sterka vilja traðka vegin fram
tað gulli tú vísti mær
eg vil halda tað nær
eg vil aldrin gloyma
alt tað tú bar
tí tín kurv var øðrvísi og vakrari
tín kurv var stuttlig og spennandi
har var altíð okkurt í

Eg havi verði so spent uppá tínar planir
Tí tú ætlaði tær so nógv
Men eg veit at har tú ert nú
Har kanst tú gera alt sum tú vilt
Tað er við stórum sakni at eg sigi hetta
Eg vil altíð minnast teg

Takk fyri allar tær fantastisku løturnar vit høvdu saman, orð kunnu ikki lýsa hvat eg føli og hvat sakni, men tað er í lagi at ikki brúka orð til alt..

Tú var eitt vælsignilsi og ein stór gáva.

**Heilsan vinur tín Guðrið**